# Endaði í rættinum

**Tá Fuglafjarðar kommuna álegði eitt vørugjald á landing av uppisjóvarfiski vildi Havsbrún ikki gjalda, tí teir meta, at skipini eiga rokningina**

Leo Poulsen

1. januar 2008 legði Fuglafjarðar kommuna eitt vørugjald á landing av uppisjóvarfiski. Hetta boðaði kommunan frá í skrivi til Havsbrún 12. desember 2007, men Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún greiddi í rættinum frá, at borgarstjórin, Sigurð Simonsen, í telefonsamrøðu hevði sagt, at hetta ikki kom at merkjast hjá Havsbrún, tí skipini skuldu gjalda.

Hetta stríðir kortini mótir øllum siðvenjum, tí sum sakførarin hjá Fuglafjarðar kommunu vísti á, so er tað móttakarin av vøruni, sum eigur at gjalda vørugjaldið.

Sambært Bergur Poulsen var vørugjaldið íroknað útflutningsgjaldið, sum virkið rindar, tá teir flyta lýsi og mjøl út. Hetta er kortini ikki ein avtala, sum Sigurð Simonsen kennir nakað til.

Málið fríggjadagin var kortini bert ætlað at avgera spurningin um, hvør rætti saksøkti var. Hesin spurningurin var kortini tengdur saman við restini av málinum, og dómarin avgjørdi tí at útseta málið til einaferð í januar, so verjin hjá Havsbrún kundi fyrireika seg til annan partin av málinum.

Upphæddin, sum Havsbrún sambært Fuglafjarðar kommunu skyldar, er 1.118.246,55 krónur. Hetta er fyri 2008.

Vørugjaldið er ásett til at vera 0,75% av søluvirðinum. Havsbrún hevur kortini ikki upplýst fyri kommununi hvussu nógv er landað og fyri hvat virði er á landaða fiskinum. Kommunan hevur tí fingið til vega hesi tøl aðrastaðni frá.

### Gjalda fyri koyring

Bergur Poulsen greiddi í rættinum frá, at tá virkið fór frá at flyta alt út til eisini at selja í Føroyum, varð avtala gjørd um at rinda ávíst vørugjald av tí, sum varð koyrt eftir keiini.

Hetta varð gjørt, fyri at kommunan ikki skuldi missa pening, var upplýst í rættinum.

Vørugjald hevur sum kunnugt ikki áður verið álagt landingum í Fuglafirði, men sambært borgarstjóranum fekk Havsbrún longu 7. februar 2007 eitt ætlanarskriv, har kommunan boðar frá, at frá 1. januar 2008 verður vørugjald álagt landingum til Havsbrún.

Sigurð Simonsen segði, at kommunan ongantíð hevur havt nøkur viðurskifti við skipini, men bert til tey virkir, sum eru í bygdini. Hann segði eisini, at tað var trupult at rættvísgera m ótvegis hinum virkjunum, at Havsbrún slapp undan av rinda vørugjald.

Stjórin á Havsbrún vísti í sínum lag á, at 30% av inntøkunum hjá Fuglafjarðar kommunu koma frá Havsbrún, beinleiðis og óbeinleiðis, og hann metti ikki, at virkið átti at gjalda meira til kommunukassan.

Hvussu málið fer at enda ber sjálvandi bert til at gita um, men eingin avgerð fellur tó fyrr enn málið verður tikið upp aftur einaferð í januar mánað.

Sakførarin hjá Fuglafjarðar kommunu vísti á eina røð av dømum, ikki bert í Føroyum, men eisini í Danmark, Noregi og Íslandi, har tað eru virkini, ið rinda vørugjaldið og ikki skipini.

Sakførarin hjá Havsbrún vísti hinvegin á lógartekstin sum sigur, at tað eru skipini ella umboðsmaður teirra, ið skulu rinda vørugjaldið.


*Ósemja millum Fuglarjarðar kommunu og Havsbrún um vørugjald av uppisjóvarfiski er endað í Føroya Rætti*

# Fangað í fátækrafellu

**Fyri mong av starvsfólkunum á Fiskavirking er tað sera tungt at klára seg, og fer inntøkan enn longri niður, er ikki gjørligt hjá hesum familjum at svara hvørjum sítt**

Leo Poulsen

Fyri mong av starvsfólkunum í Føroya Fiskavirking, er tað ein vanlukka, at arbeiðsplássi hjá teimum lat aftur nú fríggjadagin, tí hóast tey fáa pening úr Als, so er tann stuðulin ikki nóg stórur til, at tey kunna svara hvørjum sítt.

Í longri tíð hevur óstøðugt arbeiðið verið á Føroya Fiskavirking, tískil hava starvsfólk verið noydd at verið í fiskavirkisskipanini í Als. Fiskavirkisskipanin gevur tó ikki tað heilt stóra,



og inntøkurnar hjá nógvum av arbeiðsfólkunum hava tískil ikki verið stórvegis meir enn 10.000 - 12.000 kr um mánaðin.

Tá ið arbeiðsfólki kemur upp í Als verður roknað út, hvussu nógv inntøkan hevur verið seinasta árið, og tú fært síðani 80% av tí. Fyri mong av starvsfólkunum hevur tað verið sera tungt, at klára seg seinastu tíðina, og fer inntøkan nú enn longri niður, er ikki gjørligt hjá hesum familjum at svara hvørjum sítt.

Tað er møguligt, at onkur kunna fáa nakað umvegis forsorgarlógina, men tað er ongin lóg sum tryggjar, at fólk ikki skulu liva í fátækradømi. Verandi ásetingarnar í forsorgarlógini megna neyvan at lofta øllum familjunum, sum rakt vera.

Politiskt má hesin trupulleiki takast upp, og viðgerast má eisini, um ikki til ber at gera eitthvørt, sum tryggjar, at hesi mongu fólk fáa arbeiði aftur beinanvegin, ímeðan ein sølutilgongd fer fram.